Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Víkar

Spurningar:

1. Er nøkur ætlan um at seta eina tíðarfreist fyri at fáa vrakið av Hellutanga tikið upp?
2. Eru kanningar gjørdar av, hvørji árin kunnu vera av óhappinum á Víkum?
3. Um ja, hvat vísir kanningin?
4. Er tað hugsandi at gera náttúruperluna á Víkum til tjóðargarð ella friðað økið?

Viðmerkingar:
Fyri stuttari tíð síðan sóust myndir av náttúruperluni á Víkum. Tó sæst á myndunum, at náttúruperlan er skemd, nú vrakið av Hellutangi er tægað sundur. Føroya Náttúru- og umhvørvisfelag og onnur hava í fleiri umførum mælt frá at loyva aling á Víkum. Hesum hevur ikki verið lurtað eftir, og vit standa nú í støðuni, har Hellutangi liggur tægaður sundur sum vrak og skemmar náttúruøkið har.

Við lógaruppskotinum um náttúruvernd fer tað at verða møguligt at skipa øki sum tjóðargarð fyri at verja tey fyri størri náttúruinntrivum. Tí verður spurt, um tað er hugsandi at skipa Víkar sum tjóðgarð ella friðað øki.

Á Løgtingi, 29. apríl 2022

Hervør Pálsdóttir